## NSÍ hevur fingið nýggjan formann

Undan aðalfundinum hjá Nes Sóknar Ítróttarfelag um vikuskiftið var tað greitt, at formaðurin seinnu árini, Andrias Lamhauge, legði frá sær. Nýggjur formaður í NSÍ er Dánial Petur Hansen. Hini í nevndini eru: Marner Pattinson, næstformaður, Jan Lauritsen, kassameistari, Jákup Vágsheyg, skrivari, og Valdi Olsen, nevndarlimur. Eykalimir eru Magnus Knudsen og Hallur Knudsen.



## Føroyingarnir eru uttanfyri

Venjingardystirnir benda ikki á, at føroysku spælararnir í superliguni vera millum teir fremstu, tá ið tað um eina viku verður farið undir aftur donsku landskappingina.

Tveir føroyskir spælarar eru á lønarlistanum í superliguni – Jón Rói Jacobsen og Súni Olsen. Teir báðir spæla í AaB, og tá ið Aalborg í gjár spældi næstsíðsta venjingardystin, áðrenn tað verður farið undir aftur landskappingina, vóru hvørki Súni Olsen ella Jón Rói Jacobsen á vøllinum. AaB spældi á útivølli í Ikast ímóti FCM, sum vann 1-0.

# Gullið fór til Klaksvíkar



*Tað var skjótt, at klaksvíkingar høvdu telvað seg lidnar. Og so stóðu fýra tímar í bíðirøð á skránni, áðrenn gullið endaliga kundi staðfestast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sannur dramatikkur valdaði, tá føroya-meistaraskapurin varð avgjørdur í vikuskiftinum. Gullið kundi eins væl endað í Vestmanna, men klaksvíkingar vóru kaldari, tá ið á stóð**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Kappingin um gullið kundi ikki verði meiri spennandi, tá ið 1. deild og hinar deildirnar telvaðu seinastu leikirnir í FM-liðkappingini 2006/2007.

Metstór mannamúgva trokaðist kring talvið á 4. borði í dystinum millum Vestmanna og Klaksvík 2. Rani Baldursson á klaksvíksliðnum hevði í fleiri tímar havt greiðan fyrimun ímóti Jákup á Rógvu Andreasen, og Rani mátti eisini vinna fyri at hjálpa Klaksvík 1. Men Jákup reisti seg og knappliga var javnleikur í luftini umframt, at Rani var í svárari tíðarneyð.

Vestmenningar luktaðu eina løtu gull og heiður, men so skuldi ikki verða. Rani gjørdi sær hegnisliga dælt av óneyvleikum og nervøsiteti hjá vestmenninginum, og endin varð, at Rani setti Jákup skák og mát við 20 sekundum eftir á klokkuni! Klaksvíkingar vórðu ovurfegnir og gullrópini ljómaðu væl og víða.

### Nakrir tímar frammanundan…

Dysturin millum Klaksvík 1 og Havnina endaði 2-2. Heldur óvæntað vann Andrias Ziska trygt á Finnbjørn Vang, meðan Ólavur Simonsen vann somuleiðis trygt á Sigurði Justinussen. Heini Olsen og Martin Poulsen telvaðu javnt eftir fáum leikum.

Steintór Rasmussen og Martin Brekká leiktu eitt áhugavert talv á 2. borði. Martin hevði fyrimun í miðspælinum, men orkufreki og fantasiríki talvstílurin hjá Steintóri bjargaði honum og klaksvíkingum javnleik.

Tískil 2-2 og tá ið hesin dystur var liðugt telvaður, var einki talv avgjørt í hinum dystinum. Vunnu vestmenningar 3-1 vórðu teir føroyameistarar. Men eftir fýra tímar høvdu teir støður til bert 2 stig.

Samson Højgaard hevði møguleika at vinna í miðspælinum, men hann sá ikki mátgevandi leikin, og mátti í drúgvum endatalvi taka til takkar við javnleiki.

Lítið og einki hendi fyrstu 4-5 tímarnar í talvinum millum Carl Eli N. Samuelsen og Terja Petersen. Carl Eli mátti tó treiskast alt hann varð mentur fyri at vinna, og endin varð eisini, at ein møddur Terji leikti skeivt og stigið fór til vestmenningar.

Beint undan avgerðin fall á 4. borði, hevði John Rødgaard vunnið á Rana Nolsøe. Eisini í hesum talvi tóktist talvið at enda javnt, men Rødgaard hevur sera góðan endatalvsteknikk, og tað var í royndini júst tað, ið avgjørdi talvið.

Serliga varð úrslitið hjá væltelvandi Heina Olsen orsøkin til FM-heitið. Ein kærkomin sigur, nú tað eru 40 ár síðan Klaksvíkar Talvfelag varð endurstovnað. Umframt 1. deild, vunnu klaksvíkingar unglingadeildina og 3. deild. Eitt megnarár hjá KTF.

### Vestmenningar vunnu 2. deild

Ein góð troyst hjá vestmenningum hendan lagnudag í Læraraskúlaauluni varð, at 2. liðið vann sannførandi næstbestu deildina. Vestmanna endaði 4 stig framanfyri Toftir og Havnina 2. Spennandi verður at vita hvussu vestmenningar megna uppgávuna við tveimum liðum í 1. deild.

Klaksvík 3 vann somuleiðis sannførandi 3. deild framanfyri Havnina og Sandavág.

Í unglingadeildini kláraðu klaksvíkingar júst at troka seg fram um sandavágsdreingirnir, og endaðu hálvt stig fremst.

## Talvúrslit og -støður

**1. deild**
**10. umfar**

| | |
|---|---|
| Vestmanna-Klaksvík 2 | 2,5-1,5 |
| John Rødgaard-Rani Nolsøe | 1-0 |
| Carl Eli N. Samuelsen-Terji Petersen | 1-0 |
| Samson Højgaard-Haldur Suni Johansen | 0,5-0,5 |
| Jákup á Rógvu Andreasen-Rani Baldursson | 0-1 |
| **Klaksvík 1-Havn** | 2-2 |
| Heini Olsen-Martin Poulsen | 0,5-0,5 |
| Steintór Rasmussen-Martin Brekká | 0,5-0,5 |
| Finnbjørn Vang-Andrias Ziska | 0-1 |
| Ólavur Simonsen-Sigurð Justinussen | 1-0 |

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Klaksvík 1 | 22,0 |
| 2 | Vestmanna | 21,5 |
| 3 | Havnin | 14,0+ |
| 4 | Sandavágur | 11,0 |
| 5 | Klaksvík 2 | 10,5 |

**2. deild**

| | |
|---|---|
| Havnin 2-Sandavágur 2 | 1,5-2,5 |
| Vestmanna 3-Toftir | 1,5-2,5 |
| Vestmanna 2-Havnin 3 | 3,5-0,5 |

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Vestmanna 2 | 26,5 |
| 2 | Toftir | 22,5 |
| 3 | Havnin 2 | 22,5 |
| 4 | Havnin 3 | 21,5 |
| 5 | Sandavágur 2 | 19,5 |
| 6 | Vestmanna 3 | 6,5 |

**3. deild**

| | |
|---|---|
| Skopun-Klaksvík 3 | 1,5-2,5 |
| Klaksvík 4-Havnin 4 | 1-3 |
| Rókur-Sandavágur 3 | 1-3 |
| Havnin 5-Gøta | 3,5-0,5 |
| Vestmanna 4-Sandavágur 4 | 0-4 |

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Klaksvík 3 | 27,0 |
| 2 | Havnin 4 | 24,5 |
| 3 | Sandavágur 3 | 24,0 |
| 4 | Havnin 5 | 22,0 |
| 5 | Rókur | 21,5 |
| 6 | Skopun | 15,5 |
| 7 | Gøta | 14,0 |
| 8 | Sandavágur 4 | 13,0 |
| 9 | Klaksvík 4 | 11,5 |
| 10 | Vestmanna 4 | 3,0 |

**Unglingadeildin**
**10. umfar**

| | |
|---|---|
| Havnin-Klaksvík | 1-3 |
| Rókur-Skopun | 4-0 |

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Klaksvík | 23,0 |
| 2 | Sandavágur | 22,5 |
| 3 | Rókur | 19,5 |
| 4 | Havnin | 8,5 |
| 5 | Skopun | 6,5 |